# Reinur roykur yvir land og bý

**IRF og Tórshavnar Kommuna hava gjørt sáttmála við danskt felag um eina reinsiskipan fyri royk til brennistøðirnar. Endamálið er at minka útlátið av skaðiligum evnum í roykinum við 99 prosentum**

BRENNISTØÐIR
*Snorri Brend*
*Myndir: Bárður*

**Rusk:** - Eitt gleðiligt og gagnligt samstarv.

Hesi bæði orðini vórðu fleiri ferðir nevnd fyrrapartin í gjár, tá ein sáttmáli um eina nýggja reinsiskipan av royki fyri báðar brennistøðirnar varð undirskrivaður.

Endamálið við hesi avtaluni við danska felagið ALSTOM er at minka um skaðaevnini í roykinum við heilt upp til 99 prosent.

Arbeiðið uppá hesi reinsiskipanina byrjar í apríl mánaði komandi ár. Og í september mánað skal henda skipanin so takast í nýtslu.

Kostnaðurin fyri báðar reinsiskipanirnar og annað í hesum sambandi verður mett til slakar 40 mió. kr.

## Verja umhvørvið

Tá sáttmálin var undirskrivaður ígjár segði formaðurin í Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum, Regin Jacobsen, at tað bert eru fyrimunir við slíkum samstarvi millum IRF og Tórshavnar Kommunu.

- Við hesum samstarvi kunnu vit útvinna meiri og meiri. Umframt hetta so kunnu vit eisini spara hópin av peningi, segði hann.

Regin vísti á, at fyri báðar tær føroysku brennistøðirnar er vernd av umhvørvinum eitt av teimum stóru málunum, - ikki bert umhvørvið á landi, men eisini á sjógvi.

- Vit eru so lítil tjóð, og vit liva eisini av at útflyta fisk, og tí er neyðugt at vit eru frammarlaga í umhvørvisarbeiðinum. Spyrjast tey tíðindi, at vit hava trupulleikar við ávísum dálkandi evnum, so kann tað raka okkum sera meint.

- Tí er neyðugt at gera nakað fyri okkara umhvørvi, og helst so, at vit eru uppá forkant av menningini, segði Regin við týðiligari ábending til hesa nýggju skipanina við roykreinsan.

## Eingi landamørk

Elin Lindenskov, sum er forkvinna í Heilsu- og umhvørvisnevndini í Havn fegnaðist eisini um hetta samstarvið.

Hon nevndi, at henda býráðssamgongan hevur sett sær høg mál í arbeiðinum fyri einum reinari umhvørvi í høvuðsstaðnum. Og henda nýggja roykskipanin, sum nú skal setast upp, er enn eitt stig á hesi leið.

Við hesi skipanini kann Tórshavnar Kommnuna eisini í framtíðini gera enn meiri fyri at halda sína egnu kommununu reina, samstundis sum hon er við í arbeiðinum við at verja umhvørvið í Føroyum.

- Dálkingin spyr nevniliga ikki eftir kommunumørkum ella landamørkum.

- Og tí er neyðugt at vit hugsa bæði um umhvørvið í okkara egnu kommunu, okkara egna landi og hugsa um okkara ábyrgd av at halda allan heimin reinan, segði hon.

# Reinsiskipan fyri 40 mió. kr.

**Tær báðar brennistøðirnar fingu í vár eina nýggja umhvørvisgóðkenning. Út frá hesi góðkenning verða krøvini til reinsing av royki munandi herd**

BRENNISTØÐIR
*Snorri Brend*



*Umboðini fyri IRF og Tórshavnar kommunu, saman við umboðum fyri Alstom hava júst undirskrivað avtaluna. Nú skal farast til verka, soleiðis at reint og frítt verður økið títt*

Í dag er nøgdin av saltsýru í roykinum eini 500 milligram í hvørjum rúmmetri. Men í framtíðini eru krøvini, at henda nøgdin skal minkast munandi – í veruleikanum heilt niður í 20 milligram.

Hetta setir sjálvandi stór krøv til útgerðina á báðum brennistøðunum, sum komandi ár fáa settar nýggjar silo'ir til hesa reinsiskipanina.

Talan verður um tvær silo'ir, sum eru góðar 20 metrar høgar. Aftrat hesum skal onnur útgerð eisini setast upp, m.a. til máting av innihaldinum í roykinum. Tilsamans fer henda íløgan at kosta hvørjari brennistøð slakar 20 mió. kr.

Sambært tíðarætlanini so verður farið undir at seta ta fyrru reinsiskipanina upp á Hagaleiti í apríl mánaði komandi ár. Tá hetta arbeiðið er liðugt verður farið undir sama arbeiðið á Hjalla. Hetta arbeiðið skal verða liðugt í september mánaði komandi ár.

Og tað er ikki at taka seg aftur í, at stórar vónir og stór krøv verða settar til hesar báðar skipanirnar.

- Hetta er eitt stórt stig á leiðini fram móti einum reinari umhvørvi, bæði her á landi, men eisini í alheiminum, verður sagt.

## Skúlin má útbyggjast

**Hósvík:** Talið av skúlabørnum í Hósvík er skjótt vaksandi. Tí hevur kommunan sæð seg noydda at fara undir fyrireiking av eini útbygging av verandi skúla.

Í hesum skúlaári, sum byrjaði mánadagin, er næmingatalið í skúlanum 44, harav seks næmingar eru farnir í skúla á fyrsta sinni.

Men talið av skúlabarnum er nú so stórt, at Sunda kommuna hevur verið noydd at leiga seg inn í bygdarhúsið í Hósvík sum eina fyribilsloysn.

Á bygdaráðsfundi mánadagin skal kommunan taka støðu til hetta málið við útbyggingini av skúlanum. Ætlanin er at fáa gjørda eina kostnaðarmeting, soleiðis at skúlin kann fáa tvær skúlastovur aftrat sum skjótast.

Hinvegin so er enn eingin peningur játtaður á fíggjarlógini til leigu, men 100.000 kr. eru kortini játtaðar til projektering.

Fíggjarnevndin mælir tí á fundinum til at ein leysgevur hesar 100.000 kr. Mælt verður í hesum sambandi til at nýta tær 10.000 kr. til leigu av bygdarhúsinum.

Í sama viðfangi verður skotið upp at tekniska nevnd fer undir at projektera fyri eini útbygging av skúlanum.

**sb.**



*Barnatalið í Hósvík er vaksandi. Og nú verður neyðugt at byggja upp í verandi skúlan*

## 4.600 fiskidagar undir Føroyum

**Fiskivinna:** Fyrstu sjey mánaðirnar í ár hava útlendsk fiskifør veitt góð 333.000 tons í føroyskum sjógvi.

Tá tað snýr seg um dagarnar, tey hava verið í okkara sjóøki, hava útlendsk fiskifør úr íalt 9 londum, er talan um íalt 4.616 fiskidagar. Av hesum døgum hava tey russisku verið her longst, - íalt í 1.918 dagar.

Tað eru kortini tey íslendsku skipini, sum hava veitt mest hetta tíðarskeiðið. Síðani ársbyrjan hava tey veitt 166.000 tons, av hesum vóru góð 162.000 tons svartkjaftur. Saman við teim russisku skipunum eru tað hesi bæði londini, ið eiga bróðurpartin av svartkjaftaveiðuni higartil í ár.

Í mun til undanfarin tíðarskeið so hava eingi skip úr Írlandi, Portugal, Estlandi og Japan veitt nakað í okkara sjóøki.

Annars kann nevnast, at í ár hava tey útlendsku fiskiskipini ikki veitt ein einasta stert av rossamakreli ella prikkafiski, og heldur ikki er nakað kilo av brugdulivur fingið til vega.

**sb.**

# Nógv arbeiði á Fiskavirking

**Seinastu átta vikurnar hevur heilt nógv virksemi verið á virkinum hjá Føroya Fiskavirking í Vági**

FISKAVIRKING

**Vágur:** Virkisleiðarin, Petur Johannesen sigur við Suðurrás, at eini 70 fólk hava arbeitt hvønn dag og teir hava tikið ímóti heilt nógvum fiski.

Fyrr í vikuni landið Roc Amadour 70 tons. Hetta er aðru ferð innanfyri tvær vikur, at Roc Amadour landar í Vági. Petur Johannesen greiður frá, at ordrarnir eru har.

- Spurningurin er bara um at fáa fisk. Og fáa vit fisk, so verður arbeitt hvønn dag, sigur hann.

## Gullllaksur

Á virkinum hjá Føroya Fiskavirking í Vági hevur eisini verið arbeitt við at seta upp maskinur og útgerð at arbeiða gulllaks.

Petur Johannesen greiður frá, at so nógv arbeiði hevur verið seinastu tíðina, at tað hava ikki rættiliga verið stundir til at gera útgerðina til gulllaksin heilt klára.

- Hetta verður gjørt í komandi viku, og verður væntandi klárt at taka ímóti gulllaksi í aðru viku, verður upplýst.

Virkini hjá Fiskavirking í Vági og á Tvøroyri hava ikki verið afturlatin í summar, eins og fleiri virkir norðanfjørðs, og hevur hetta helst eisini ført við sær, at meiri arbeiði hevur verið her suðri enn vanligt.

**sb.**